# Cynthia rindar prísin

**Fyri seks árum síðani valdi Bozena Krawczyk at fylgja í fótasporunum hjá systur sínari og flyta til Føroya at arbeiða. Nú hevur Útlendingastýrið noktað at longja arbeiðs- og uppihaldsloyvið hjá henni. Bozena sigur, at hetta ger, at 13 ára gamla dóttirin, Cynthia, sum er vorðin føroyingur, rindar prísin**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*– Um eg fekk at vita, tá eg kom, at eg ikki kundi væntað, at Cynthia fór at sleppa at ganga í skúla her allatíðina, so hevði eg ivaleyst havt umhugsað mína støðu, sigur Bozena, sum arbeiðir á Roykivirkinum í Klaksvík*

**Klaksvík:** Bozena Krawczyk og bæði børnini hjá henni búgva saman við systur Bozenu og hennara familju. Tey hava búð í Føroyum í góð seks ár, men nú letur til, at dagarnir hjá teimum í Føroyum eru taldir.

Útlendingastýrið hevur tvær ferðir noktað at leingja arbeiðs- og uppihaldsloyvið hjá Bozenu, og tí mugu hon og 13 ára gamla Cynthia av landinum innan ein mánað, um ikki tær kæra avgerðina.

Hetta hevur fullkomuliga vent upp og niður upp á lívið hjá Bozenu, systrini og allari familjuni.

### Cynthia óvissa framtíð

Serliga 13 ára gamla Cynthia hevur fortreð av hesum. Hon er við árunum vorðin ein føroysk genta, sum hevur gingið øll síni ár í fólkaskúlanum í Føroyum.

Tískil má polskt sigast við tíðini at verða vorðið hennara annað mál.



*– Allir mínir vinir eru her. Eg dugi ikki so væl polskt longur, og mær dámar best í Føroyum, sigur 13 ára gamla Cynthia Krawczyk, sum gongur í 7. b í Ziskatrøðskúlanum*

Bozena stúrir mest fyri tannáringadótrini hjá sær.

Við tárum í eygunum spyr hon, hvussu hennara 13 ára gamla dóttir skal kunna klára seg í einum polskum skúla nú.

– Eg haldi, hetta er nógv fyri. Um eg fekk at vita, tá eg kom her, at eg ikki kundi væntað, at Cynthia fór at sleppa at ganga í skúla her allatíðina, so hevði eg ivaleyst havt umhugsað mína støðu tá. Men hetta er komið sum ein skelkur, og hevur gjørt serliga hana sera ótrygga, greiða Bozena frá.

Cynthia sjálv hevur bert sitið og lurtað eftir, meðan mamma hennara hevur greitt frá.

Hon sigur sjálv, at um hon hevði sloppið, so hevði hon viljað verið í Føroyum hjá mostrini og so farið til Póllands at vitja av og á.

Hetta fær tár fram hjá bæði móður og dóttir, tí sjálvandi høvdu tær viljað, at tær báðar kundu verið saman í Føroyum.

– Um hon ikki fær tað, so veit eg ikki, hvussu tað verður við hennara framtíð, tí skúlin í Póllandi er heilt øðrvísi, og eg trúgvi ikki, at hon kann megna at fáa teir polsku næmingarnar aftur. Tí kann hetta koma at hava skeiva ávirkan á restina av lívinum hjá henni, sigur Bozena.

Hon leggur afturat, at Cynthia ikki tosar polskt reint longur, so tað kann fara at verða ein stórur trupulleiki fyri hana at byrja í einum polskum skúla. Hon er heldur ikki von við at lesa ella skriva polskt.

### Ótrygg tíð

13 ára gamla Cynthia hevur verið sera ótrygg, síðani mamma hennara fekk fyrsta noktandi svarið frá Útlendingastýrinum fyrr í summar. Síðani var hoyring um hennara mál, har Bozena millum annað vísti á støðuna við Cynthiu.

> *– Í allarringasta føri hevði eg viljað, at Cynthia kundi verðið eftir her og gingið í skúla sum vanligt, men mítt hægsta ynski er, at vit øll kunnu verða verandi í Føroyum*

Bozena sigur, at støðan hjá dótrini vigar mest í hesum málinum.

– Í allarringasta føri hevði eg viljað, at Cynthia kundi verðið eftir her og gingið í skúla sum vanligt, sigur hon. Men leggur samstundis dent á, at hennara hægsta ynski er, at tey øll trý kunnu verða verandi í Føroyum, so familjan ikki verður sundurskild, og lívið kann halda fram sína vanligu gongd.

– Tað er ikki lætt at hugsa sær til, at eg skal fara frá henni við líltabeiggjanum hjá henni heilt til Póllands at búgva. Men tað er sera umráðandi, at Cynthia kann gera sína skúlagongd lidna í Føroyum, sigur Bozena, sum øll seks árini hevur arbeitt á Roykivirkinum.

Skjótt telur hon í høvdinum, at talan er um fýra ár afturat í fólkaskúlanum og síðani miðnámsskúla afturat. So alt í alt verða tað eini sjey ár, har Cynthia fer at búgva í Føroyum, meðan restin av hennara familju býr í Póllandi, um ikki avgerðin hjá Útlendingastýrinum verður broytt.

### Feilur

Í brævinum, sum Bozena hevur fingið frá Útlendingastýrinum, stendur, at stýrið ikki metir tað vera tørv á arbeiðsmegi á hennara øki longur, og tí kunnu tey ikki leingja hennara arbeiðs- og uppihaldsloyvi. Og at hon tískil innan ein mánað eftir at hava móttikið fráboðanina má fara úr Føroyum.

Tað løgna er bara, at tað standa bert Bozena og Cynthia nevndar í brævinum. Onki um hálvtannað ára gamla Fabian, sum hevur føroyskan pápa. Harafturat stendur í sama brævi, at Cynthia og Bozena eru rumenarar, hóast tær altso eru úr Póllandi.

Hetta hevur vakt nakrar desperatar vónartankar um, at hetta kann vera ein feilur. Tey ganga øll mest sum í eini aðrari verð og vóna so inniliga, at talan er um ein feil.

– Men so hinvegin, teirra nøvn standa jú har, so tað kann neyvan vera ein feilur, sigur Bozena kedd á málinum.

Í sama brævi stendur eisini viðmerkt, at Bozena hevur gjørt vart við støðuna hjá dótrini, men so onki meira. Bert ein staðfesting av, at stýrið, eftir at tað hevur gjøgnumgingið málið hjá Bozenu, ikki metir, at Bozena kann leingja sítt arbeiðs- og uppihaldsloyvi sambært grein 9, stk. 2, nr. 3 í útlendingalógini.

> *– Um tað bert var ein einsamallur persónur, sum júst var komin til landið, so høvdu vit onki sagt. Men tá tað er talan um eina mammu við tveimum børnum, sum hevur búð her í meira enn seks ár, so haldi eg, at tað átti at verið meira enn bara paragraffir, sum gjørdu seg galdandi*

### Kæra

Bozena og familja hennara hava eina kærutíð upp á eina viku. Tey hava gjørt av at kæra, tí tað kann geva teimum eitt sindur av tíð at finna útav, hvat og hvussu tey skulu gera við hesa truplu støðuna, sum tey nú eru komin í.

– Eg haldi tað er løgið. Um tað bert var ein einsamallur persónur, sum júst var komin til landið, so høvdu vit onki sagt. Men tá tað er talan um eina mammu við tveimum børnum, sum hevur búð her í meira enn seks ár, so haldi eg, at tað átti at verið meira enn bara paragraffir, sum gjørdu seg galdandi, heldur systir Bozenu, Krystyna, fyri, meðan hon hyggur at Cynthiu og Fabian.

Fabian er linur og skilir tíbetur onki av øllum hóvastákinum. Cynthia og ein vinkona fara út ein túr, og Krystyna, maðurin og Bozena mugu alt fyri eitt fara í holt við at tosa við sakførara um hetta málið. Tey hava jú bara fýra dagar, til freistin at kæra er úti. Ella skulu Cynthia og Bozena av landinum innan ein mánað.

**Vit høvdu ætlað okkum at fáa eina viðmerking frá Innlendismálaráðnum, men tað eydnaðst ikki at fáa fatur á nøkrum, áðrenn blaðið fór til prentingar.**
**- sae -**



# Men tey livdu ikki lukkuliga...

**Gleðin um brúdleypið ímillum krónprins Frederik og prinsessu Mary hevði valla lagt seg, nú stórtíðindini um hjúnaskilnaðin hjá hinum prinsaparinum komu sum ein bumba um alt tað danska ríkið**

SKILNAÐUR
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*



Prinsessa Alexandra og prins Joachim skulu skiljast. Hetta varð fráboðað á einum tíðindafundi hósmorgunin kl 10.30 føroyska tíð.

Orsøkin til skilnaðin varð ikki umrødd, men sagt varð, at hetta var ein avgerð, sum varð tikin í sátt og semju.

### Varðveitur tittulin

Kongshúsið hevur gjørt av, at Alexandra framhaldandi skal hava tittulin : Hendes Højhed prinsesse Alexandra.

Hon fer fyribils at búgva í stóru íbúðini hjá parinum, sum er á Amalienborg, har hon eisini fer at hava synirnar Nicolaj, sum er fimm ár, og Felix, sum er tvey ár.

Joachim prinsur fer framhaldandi at búgva á Schalkenborg slottið, har parið higartil hevur búð.

Á tíðindafundinum varð eisini boðað frá, at foreldramynduleikin yvir smáu prinsunum verður felags, og allar avgerðir, sum viðkoma framtíð teirra, verða tiknar av báðum foreldrunum.

> *Einaferð var alt gleði og gaman, og fáur vildi trúð, at kærleikin ikki fór at vara. Men nú er vátt komið í reiðrið, og parið er sundurlisið, við tí fyri eyga at fáa hjúnaskilna*

Drotning Margreta og Heindrikur prinsur boðaðu frá, at tey fara at stuðla og hjálpa soninum og verdóttrini so væl, sum yvirhøvur gjørligt.

### Skaða umdømið

Prinsessa Alexandra hevur verið ómetaliga vælumtókt ímillum danska fólki, og eftir brúdleypið í 1995, vaks áhugin fyri kongshúsinum munandi ímillum danska fólki.

Hon hevur ofta verið skýrd at vera »hin danska Diana«, sum ikki sigur so lítið. Men hon hevur hinvegin eisini nakrar av somu eginleikunum, sum Diana prinsessa vísti.

Alexandra hevur, síðani hon fekk tittulin prinsessa, verið við í óteljandi upplatingum av bæði sjúkrahúsum, barnagørðum, søvnum o.s..fr. Hon hevur verið talsfólk fyri fleiri grunnar, og verið við í sera nógvum vælgerandi endamálum.

Spurningurin er longu byrjaður at ljóðað, hvørt hetta man fara at skaða umdømið hjá danska kongshúsinum, sum altíð hevur staðið sera sterkt í mun til hini kongshúsini.

Vit kunnu taka enska kongshúsið, sum hevur sæð skandalu eftir skandalu, og sum nú eisini hevur mist ein stóran part av stuðlinum ímillum fólki.

Svenska kongshúsið hevur eisini fingið nógva, vánaliga umtalu í seinastuni, og listin av fallandi kongshúsum er langur.

Tey kongaligu skulu jú vera symbol, tey skulu hava ein ávísan status, og tey skulu allarhelst sveima nakað yvir vanligu borgarunum.

Men við skilnaðinum, byrjar hendan ímyndin at krakkelera, og spurningurin er, hvussu hetta fer at ávirka danska kongshúsið í framtíðini.

Hjúnaskilnaður í kongshúsinum:

# Hetta er tann nýggja tíðin

**Edmund Joensen var løgmaður í 1995, tá prinsessa Alexandra og prins Joechim giftust. Tí vóru hann og konan Edfríð boðin við í brúdleypið. – Tíðindini um hjúnaskilnaðin eru sjálvsagt keðilig, men hetta er samstundis eitt tekin um, at kongshúsið góðtekur nýggju tíðina, sigur Edmund**

SKILNAÐUR
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*

– Tað var ein vakran vetrardag, at tey giftust. Tað følvaði eitt sindur, og tað var ómetaliga pent, sum vit koyrdu út til Fredensborg slot, har brúdleypið varð hildið, minnist Edmund Joensen, táverandi løgmaður.

Men ævintýrið um prinsessuna og prinsin endaði ikki, sum tá varð hildið. Tey livdu nevniliga ikki lukkuligt allar dagar sínar...

### Skakandi tíðindi

– Tá var tað tann heilt stóri romantikkurin í luftini. Tað var eitt stórt brúdleyp, sum veruliga fekk allan armin, greiðir Edmund frá, og skoytir uppí, at prinsaparið so í øllum førum fekk ta bestu byrjanina á hjúnabandið, sum gjørligt.

Edmund heldur, at tíðindini um ein kongaligan hjúnaskilnað, altíð koma sum ein skelkur.

– Tú gerst altíð skakkur, tá eitt kongaligt par velur at fara frá hvørjum øðrum. Tey eru jú ímyndin av tí størsta romantikkinum, sum er. Tað er dreymurin hjá hvørjari gentu og hvørjum dreingi, at sleppa at uppliva tað, sigur Edmund Joensen.

Men hinvegin heldur Edmund, at hetta er ein ógvuliga realistisk hending í okkara parti av heiminum.

– Í vesturheiminum eru tað jú útvið helmingurin av hjúnabondunum, sum brotna. Tey eru hóast alt vanlig menniskju, so á tann hátt er hetta ikki nakað øðrvísi enn hjá so mongum øðrum, sigur hann.

Edmund heldur tó, at prinsessa Alexandra og Joachim prinsur kanska ikki heilt kunnu samanberast við meirilutin av teimum pørum, sum lata seg skilja alíkavæl. Tey bæði hava jú ógvuliga ymiskar bakgrundir, og koma frá tveimum heilt ymiskum mentanum.

– Tá tvey fólk av so ymiskum uppruna velja at leggja lívsleiðirnar saman, krevur tað nakað heilt eyka. Og tað er minni enn so altíð at tað er haldbart í longdini. Tað er nógv verri hjá tveimum so ymiskum fólkum at fáa tað at fungera, enn hjá tveimum við sama uppruna, staðfestir Edmund.

### Nýggjar tíðir

– Hetta eru ikki nøkur stuttlig ella positiv tíðindi hjá Margretu Drotning og hoffinum at skula út við. Men samstundis er hetta júst eitt tekin um, at Danmark er eitt frítt, opið og demokratiskt land, har øll hava rætt at liva sum tey ynskja, eisini tey kongaligu, heldur Edmund.

Hann heldur, at tað als ikki er vist, at hetta fer at skaða umdømið hjá danska hoffinum, sum annars hevur verið ógvuliga sterkt og traditiónsríkt í øllum umheiminum. Tvørtuímóti heldur Edmund, at hetta kann vera eitt tekin um, at eisini danska hoffið hevur tikið við nýggju, fríari tíðini, og loyvir skilsmissum.



*Edmund og Edfríð Joensen hava verið í báðum prinsabrúdleypunum. – Brúdleypið hjá Alexandru og Joachim var ógvuliga romantiskt. Tey fingu í øllum førum ta bestu byrjanina, sigur Edmund*

– Tekini, sum við hesum hjúnaskilnaðinum, verða send út í alheimin eru, at í Danmark verður eingin sópaður undir teppið. Um tey halda hetta vera tað besta, so verður tað loyvt, um tað er tungt, sigur Edmund.

Hann heldur, at Margreta drotning jú eisini kundi gjørt, sum tað varð gjørt í enska kongshúsinum, tá Charles prinsur og Diana prinsessa vórðu skild. Men Alexandra sleppur at behalda sínar titlar, hon verður fyribils búgvandi á Amalienborg o.s.fr.

– Hetta verður alt loyst í sátt og semju, á ein ógvuliga sámiligan hátt, og tað er avgjørt eitt gott signal at senda út, fyri tað danska kongshúsið. Tað, sum man fatar av hesum, er at »hetta er tann nýggja tíðin, sum vit eisini acceptera«. Men sjálvsagt er tað sera harmiligt, endar Edmund Joensen við at siga.